gult8 cyan8 magenta8 svart8

DAGSINS MEINING

Null til fleiri ellisheim – 30 milliónir til fyrisiting

Nú valið nærkast, eru politikarar sum vanligt farnir at »jonglera« við tølum. Tað verður gjørt fyri at vísa ella prógva, hvør hevur framt tey størstu og bestu avrikini til frama fyri ein ella annan samfelagstátt.

Eftir at formaður Javnaðarfloksins hevði sligið fast, at politikkur floksins var »Vælferð fram um fullveldi«, svaraði formaður Tjóðveldisfloksins aftur, at gongdin í hesum valskeiðnum er »minni blokkur – men meira til almanna-, heilsumál, útbúgving og mentan«. Við trúligum tølum vísti varaløgmaður á, at játtanin til hesi øki eru økt 9 prosent hetta valskeiðið. »Stik den«!

Hesi tøl vóru próvfast hjá vanliga lesaranum, til løgtingsmaðurin Hans Pauli Strøm legði upp í og slerdi fast, at játtanin til hesi málsøki er lækkað eini 20 prosent í virði seinastu árini, og at formaður Tjóðveldisfloksins hevur ikki tikið prísvøksturin – inflatiónina – við í síni talframløgu. Eftir tølunum hjá løgtingsmanninum í Norðurstreymoy hevur prísvøksturin verið 49 prosent, meðan játtanin til almenna- og heilsumál, útbúgving og mentan bara er hækkað 26 prosent. Skuldi játtanin hildið tørn, var hon ikki 1,7 milliard, men uppi á 2,5 milliardum. »Kom so aftur Høgni«!

»Hvor om alting er«, so sigur tann kaldi veruleikin, at grundleggjandi tørvurin innan fleiri samfelagstættir er »skriggjandi«. Skúlanum vantar pening fyri at halda nýggju lógina. Landssjúkrahúsið noyðist at steingja deildir á jólum og um summarið. Menningartarnað verður aftur í ár rikin út. Dagrøktin fær ikki so mikið av peningi, at hon kann vaska hjá teimum gomlu nú í summar! O.s.fr. O.s.fr.

Men, sum Karsten Hansen segði við Útvarpið mánadagin, tørvurin er ómettiligur. Rætt hevur hann í tí, og rætt er at vera varin í játtanum, men hvussu skilja eldri fólk, at tað verður ikki vaskað hjá teimum, samstundis sum Karsten telur milliónir og milliónir í avlopi á Argjum? Tað skilja bara tey, sum ganga í blindum, og trilva seg fram móti tí eina »saliga« málinum!

»Skomm«, kallar Hans Pauli Strøm støðuna í seinri grein síni. Hon slær at enda fast, at samstundis sum 0 (null) milliónir eru játtaðar til fleiri ellis- og røktarheim hetta valskeiðið, hóast tørvurin er 300 milliónir til íløgur og 100 til árligan rakstur, er játtanin til Miðfyrisitingina (aðalstýrini) økt 30 milliónir ella 98 prosent. Tað hevur óivað verið neyðugt, men játtanin til tey eldru er nógv meiri neyðug. Tað er henda játtanin komandi fíggjár, sum m.a. skal vísa, hvussu samhaldsfastir Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eru, ella ikki eru!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Hvør skal umsita borgaran?

Eyðgunn Samuelsen,
formaður í Sosialu Nevnd Klaksvíkar Býráð

Seinastu vikurnar hava tey stórtíðindi verið í fjølmiðlunum, at Almannastovan flytur út í kommununar við at seta á stovn økisskrivstovur runt um landið. Hetta hevur ljóðað sum um, at nú verður umsitingin lagað til økismenning, og nú kemur umsitingin nærri borgaranum. Lat tað vera sligið fast beinanveg, onki er um hesi tíðindi, komið verður ikki nærri borgaranum enn í dag!! Hetta hevur als onki við økismenning at gera og hevur onki samband við tær ætlannir, ið landstýrið hevur sagt seg at hava um at leggja økir út til kommununar at umsita – tvørturímóti.

Tað sum í veruleikanum hendir, er at tey mál, ið ikki eru átroðkandi fyri borgaran, skulu liggja hjá eini landsumsiting úti í økjunum. Fyri Klaksvíkina merkir hetta als onki, tí tey eru jú har longu nú, og kommunan hevur als onga ávirkan á hesi øki. Fyri alt tað, so kunnu tey altíð flytast burtur aftur av ovastu leiðsluni, ið framvegis liggur í Tórshavn.

Tey átroðkandi økini, sum eitt mál, sum ger tað gjørligt hjá henni bæði at bera fram fullu breiddina í egnum kenslum, og samstundis vísir hon áhuga fyri og tosar við síni medmenniskju. Hennara listaverk taka ofta útgangsstøði í einum kensluligum møti við náttúruna.

Inger-Lise hevur verið fleiri námsferðir í Føroyum, og okkara vakra náttúra og ikki minst teir serligu grá/grønu litirnir hava givið henni íblástur at mála spennandi tekin og djarvar mótsetningar í bæði strikum, skapi og litum.

– Tú merkir veruliga nakað av lívsins stóra leiki, tá tú stendur framman fyri listaverkini hjá Inger-Lise. Hon er at hitta á Torginum í SMS hesa vikuna

frá kl. 10 til handlarnir lata aftur, sigur SMS í tíðindaskrivi.

barnaforsorgin og eldraøkið tey skulu miðsavnast í Tórshavn!! Hetta er greitt brot á kommunuálitið, og hetta kunnu kommununar als ikki góðtaka. Tað undrar, at løgmaður, ið umsitir kommunumál kann góðtaka hetta.

Kommunala sjálvstýri.
Sambært okkara stýrisskipan, so hava kommununar rætt at skipa egin viðurskifti undir eftirliti av landstýrinum. Løgtingið ger av, hvussu umfatandi hetta sjálvstýri skal vera.

Kjarnan í tí kommunala sjálvstýrinum er, at kommununar sjálvar kunnu raðfesta tær kommunalu uppgávurnar og skipa fyri, hvussu tær skulu loysast. Tað er sjálvsagt at kommunan er betur før fyri enn landið, at nøkta ynski/tørv borgarans á staðnum. Og tað er eisini sjálvsagt, at kommunan fíggjar tær tænastur, ið hon umsitur. Hetta viðførir eisini, at borgarin dugir betur at skilja kostnaðin av tí kommunala virkseminum og betur kann seta krøv um, hvussu skattakrónurnar vera nýttar.

Hetta er eisini í samljóð við okkara fólkaræði, tí fjarstøðan millum borgaran og tey fólk, ið hann velur, er lítil og tí fær borgarin nógv stórri ávirkan.

Øki, ið kommunan eigur at umsita
Meginreglan er eftir míni áskoðan, at kommunan eigur at umsita øll tey øki, ið viðvíkja gerandisdegnum hjá borgaranum.

Kommununevndin hevur hesa raðfesting:

Fíggjarskipanin
Barnaøkið – barnaforsorgin og fólkaskúlin
Eldraøkið v.m – ellis- og røktarheim, heimarøktin
Almannaøkið – forsorg, eftirløn (møguliga)
Heilsuøkið

Henda raðfesting er gjørd í 1998.

Nevndin leggur aftrat: »Viðvíkjandi barnaøkinum. Í løtuni er barnaøkið tað mest átroðkandi málið hjá kommununum. Nevndin mælir tí til, at hetta økið verður fyrst latið kommununum. Tað snýr seg bæði um barnaforsorgina og fólkaskúlan. Eitt annað mál sum eisini er átroðkandi hjá kommununum í løtuni er eldraøkið, og mælir Kommununevndin tí til, at hetta verður næsta uppgávan, latin verður kommununum.« (Kommunáliti, Táttur II,s.119).

Samband millum orð og gerðir
Sum eg nevndi í byrjanini, so eru tað júst barnaforsorgin og eldraøkið, ið nú skulu miðsavnast í Tórshavn. So ilt er at siggja, hvat politikkurin hjá landsstýrinum er. Verður barnaforsorgin miðsavnað í Tórshavn, so verða vit einasta land í norðanlondum, har hetta økið ikki er kommunalt. At tænastan, ið borgarin fær bæði verður dýrari, liggur longri vekk og alt annað líka eisini dýrari enn í dag, fara vit als ikki at góðtaka.

Kommununar ynskja at yvirtaka hesi øki, so vit sjálvi kunnu ráða yvir egnum viðurskiftum og sjálvi kunnu standa til svars yvir fyri egnum borgarum. Tann stóri spurningurin er, hvat landsstýrið vil.

Listaframsýning á Torginum í SMS

LIST
Tíðindaskriv

Í døgunum 2. – 7. juli hevur danska listakvinnan Inger-Lise Årup listaframsýning á Torginum í SMS.

Inger-Lise, sum er útbúgvin á Kunstakademinum í Århus, hevur luttikið á fleiri útvaldum framsýningum seinasta ár. Sum listakvinna er hon ekspressiv, sum skoðar ávirkanarmegina hjá málningalistini,

Ræting

Av misgávum var navnið ikki komið undir lesarabrævið, "Óneyðugur skattalætti hjá reiðarum", sum Kári Petersen, búskaparfrøðingur skrivaði á síðu 12 í Sosialinum leygardagin. Haldið okkum til góðar.

Blaðstjórnin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9

VIÐMERKINGAR

Um skattalætta til reiðarar

Óli Jacobsen

Kári Petersen er rættuliga farin í herna móti skattaskipanina hjá fiski- og sjómonnum. Tað hevur hann sjálvsagt fullan rætt til.

Men tá hesi sjónarmið verða lýst í almennum fjølmiðlum, má ein kunna krevja, at tey nýttu sjónarmiðini byggja á veruleikan.

Í komandi FF-blað verður lýst, hvussu sjónvarpið hevur manipulerað við málið um skattin hjá fiskimonnum. Men her skal bert viðgerast høvuðssjónarmiðið hjá Kára.

Var skattalættin til reiðarar?
Og hetta er, at skattalættin veruliga er ein stuðul til reiðarar. Grundgevingin, tá málið varð lagt fram, var samb. Kára, at »fiskimenn fingu meira í hýru aðrastaðni, og av tí at føroyskir reiðarar vóru so illa fyri og ikki høvdu ráð at geva fiskimonnum meira hýru, so var neyðugt at geva fiskimonnum ein skattalætta, so føroyskir reiðarar kundu sleppa báligari...«

Í hesi grein verða endurprentaðar tær grundgevingar, sum veruliga vóru nýttar av landsstýrinum, tá málið varð lagt fram á ting í desember 1997. Og tað er heilt lætt at síggja, at tað finst ikki minsta grundarlag fyri umrøddda pástandi. Høvuðsgrundgevingin hjá landsstýrinum var tann ójavni, sum var í skattingini av fiskimonnum í Føroyum og øðrum londum á okkara leiðum. Og tað var at beina burtur henda ójavnan sum var grundgevingin fyri uppskotinum. Og mett var, at hetta fór at føra við sær, at fiskimenn, sum sigla uttanlands, fóru at støðast í Føroyum, og hetta fór at minka um tapið av skipanini.

Einki grundarlag.
Í aðrar mátar er heldur einki grundarlag fyri hesum pástandi. Í teirri propaganda sum var førd móti skattauppskotinum í 1997 varð eisini eisini ført fram, at í fyrsta umfari kom hetta fiskimonnum til góðar, men manningarfeløgini mundu fara at lora henda ágóðan yvir til reiðararnar við næstu samráðingar.

Hertil er fyrst at siga, at føroyskir reiðarar rinda ikki minni part í hýru enn reiðarí í Noregi og Íslandi, sum vit jú lættast kunnu sammeta okkum við. Og annars hava gitingarnar um, at feløgini fóru at »forera« skattalættin til reiðararnar víst seg at vera uttan nakað sum helst grundarlag.

Hesin pástandur hjá Kára er tískil fullkomiliga í-spunnin. So eg fara ikki sum Kári at nýta pláss og orku at viðgera ommurnar og abbarnar hjá fiskimonnum!

Almennur stuðul til A P Møller ikki tikin uppá tungu.
Tað er ikki so løgið, um fiskimenn ikki skilja, hví teir skulu hangast út á hendan hátt sum nassarar á samfelagnum. Serliga tá hugsað verður um, at annar sera beinleiðis stuðul til reiðarar als ikki verður tikin uppá tungu, sum t.d. tann stuðul sum føroyski skattaborgarin letur til ríkasta mann í danska ríkinum Mærsk McKinney Møller. Tað er alment kent, at tað eru fleiri hundrað føroyingar, búsitandi í Føroyum, sum als ikki rinda skatt í Føroyunum yvirhøvur. Orsøkin fyri hesum skattafrælsi er, at Møller skal sleppa so mikið báligari í hýrum. So her er í hvussu er beinleiðis stuðul til enntá danskan reiðara so tað forslær. Tað verður sanniliga latin annar stuðul í Føroyum, men tað er bert fiskimenn sum skulu standa fyri skotum á einum sera ivasomum grundarlagi.

Men at tað verður gjørt við grundgevingum, sum eru so tunnar sum umrøtt her, kann so bert sannføra fiskimenn og aðrar um, at tað skortar við sakligum grundgevingum.

Tað er í hvussu tað positiva í hesum máli at fáa hetta staðfest.

Fiskimenn og sjómenn

Vit síggja, at øll grannalond okkara hava gjørt serligar skattaskipanir fyri fiskimenn og sjómenn, soleiðis at hesir verða skattaðir linari enn borgarir sum arbeiða á landi. Hetta hevur gjørt kappingarstøðu okkara sera trupla. Í Føroyum hava vit verið afturhaldandandi at gjørt serskipanir fyri hesar menn, orsaka av at tað snýr seg um okkara høvuðsvinnu, men seinastu árini hava vit sæð, at alt fleiri føroyskir sjómenn og fiskimenn búseta seg í grannalondunum orsaka av tí stóra muni í skattingini.

Vit hava cina dubultskattaavtalu við norðurlond undantikið Grønland,ið er til stóran fyrimuns fyri okkum. Hvat fiskimonnum viðvíkur, er tað bústaðarlandi, sum hevur loyvi at skatta ein persón, og hvat flest øllum øðrum inntøkum viðvíkur, er tað landið, har inntøkan kemur frá, sum hevur loyvi at skatta.

Til tess at forða fyri at enn fleiri av okkara dugnaligu sjómenn búseta seg í grannalondum okkara, serliga Noreg, Danmark og Íslandi av skattligum áðum og fyri betur at útnýtta teir fyrimunir vit hava í okkara norðurlendsku dubultskattaavtalu, skjýtur landsstýrið upp eina nakað lagaligari skatting av øllum okkara sjó- og fiskimonnum. Vald er cin loysn, ið gevur minst møguliga umsiting.

Tann beinleiðis fíggjarliga ávirkanin av broyttu reglunum fyri skatting av fiskimonnum er cin minni inntøka til landskassan uppá umleið 28 mió.kr. og ein minni inntøka til kommunurar uppá umleið 14 mió.kr. Viðmerkjast skal tó, at í tann mun lækkingin í inntøkuskattinum fer til privata nýtslu, merkir hetta meirinntøku frá meirvirðisgjaldi og øðrum avgjøldum, uttan tað tó ber til at siga neyvt hvussu stór henda meirinntøka verður. Landsstýrið metir eisini, at sum frá líður fer tað at hava munandi fíggjarligan týdning fyri landskassan og kommunukassarnar at fiskimenn vera verðandi undir føroysku skattaskipanini, og at nakrir av teimum sum eru fluttir, flyta heimaftur.

Lesarin eigur at sammeta tær veruligu grungevingarnar, sum vórðu nýttar av landsstýrinum við tær grundgevingar, sum vera lagdar landsstýrinum í munnin í av Kára. Her finst einki samsvar! Í veruleikanum er ikki neyðugt við fleiri viðmerkingum.

Stungin í bakið

Viðmerkingar til Eyðbjørn Jacobsen

Harry Benjaminsen
Toftir 03.07.01

Sum stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag fer undirritaði at gera nakrar viðmerkingar til Eyðbjørn Jacobsen, nevndarlim í Havnar Arbeiðsmannafelag. Eitt tað fyrsta, ið rann mær í huga tá eg las hesa grein í F. F. blaðnum var, at slíkt orðaskvaldur, sum kemur frá hansara skriving, eigur ein ikki at taka í álvara, men meira ein lesur greinina, jú ósakligari gerst hon og er í nógvum førum beinleiðis ósonn.

Vígdis Johannesen vil greinskrivarin ikki viðgera, tí hon skal hanga í skjúrtufaldi Ingeborgs. Slík háðan kann ikki fara ósvarað aftur við borðinum. Vígdis Johannesen er møguliga ikki ein kvinna av nógvum orðum, men tað hon sigur er væl gjøgnumhugsað og skil í. At hon skal hanga uppií Ingeborg er heldur ikki so løgið, tá tær umboða tvey felag, sum samráðast saman, onnur skal jú vera frontfigurur.

At skíra limirnar hjá HAK at verða misnýttar av Ingeborg til at føra herferð móti HA, er tað reina tvætl.

Nevndin í HAK er samansett av 5 kvinnum, sum eru valdar í nevndina til at røkja áhugamálini hjá limum sínum og kann eg vátta, at tær kunnu og duga at siga sína meining, sum eisini verður tikin í álvara og lurtað eftir. Kundi hent, at hesar vóru dugnaligari enn fleiri av nevndarlimunum í HA.

Formanninum í FA kann eg bera alt gott sum leiðara, sum stjórnarlimir eru vit á nógvum fundum saman og sigast kann, at allar avgerðir, sum koma frá FA, ikki koma frá Ingeborg, men frá stjórnini.

Greinskrivarin átti at vitað, at vanlig mannagongd er at tað er formaðurin, sum úttalar seg vegna felagið. Hetta er møguliga ikki so hjá HA? Men bara formaðurin persónliga, sum kemur til orðanna.

Um formanssessin í FA kann upplýsast, at hon á seinasta aðalfundi varð einmælt vald til at sita í tvey ár, so hetta má vera dygg álitisváttan – eisini frá S&K, sum greinskrivarin ávarar um at »varnast vandan«?

Samráðingar:
HA fór til samráðingar í ár fyri at fáa tann »tápuliga mun«, sum var íkomin seinast, burtur fyri at fáa tað sama í løn sum FA og HAK kundu samráða seg til, um hesin gjørdist betri enn tann hjá HA. Hetta er tann beiski veruleiki.

Samráðingarupplegg tykkara er ikki eingang skrivað niður á pappír, er fortalt av álitandi keldur, so at skíra FA og HAK at skriva av tykkara krøv er tann reini heilaspuni frá tær. Nei, góði, so lágt ríða FA og HAK ikki. Tað vórðu bráktir nóvir fundir til at skriva og viðgera tey krøv, vit komu við, sum vóru fleiri síður av reguleringum og ymiskum í sáttmálanum, vit vildu betra um.

Tá greinskrivarin skuldsetir FA og HAK at leggja seg aftanfyri HA fyri at fáa syndabukkar, má ein bara smílast. Eg loyvi mær at hugsa um greinskrivarin yvirhøvur var við til samráðingarnar, tá hann er so lítið vitandi um tað, tá fór fram. Veruleikin er tann, at sáttmálin hjá HA bleiv longdur 2 samdøgur út um tíðarskeiðið tá sáttmálin hjá FA og HAK gekk út, men 8 tímar og 2 samdøgur áðrenn sáttmálin hjá HA gekk út blivu teir bleytir í knøunum og skrivaðu undir sama semingsuppskot, sum vit vrakaðu, tí eingin aldursviðbót var við, sum vit høvduagt stóra orku í og vildu hava við í ein komandi sáttmála.

Um kílaseting kann bert sigast, at FAG sjálvandi veit hvar garðurin er lægstur. Tað er so ikki hjá FA og HAK, har samarbeiðið hevur verið sera gott og vónandi kemur at halda fram arbeiðaranum at gagni.